# Sosialurin 75

Í sambandi við at Sosialurin fyllir 75 ár bjóða vit tær at tekna teg sum haldara fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum og samstundis at vera við í kappingini um hesar báðar vinningarnar:



## 1. Tøm Miklagarð

Í 10 minuttir kanst tú fylla so nógvar vørur í innkeypsvognin í Miklagarði í SMS, sum tú ført stundir til ... men bara eitt av hvørjum.

## 2. Dreymaferð við nýggju Norrönu

Vinn eina familjuferð við nýggju Norrönu hjá Smyril Line fyri 2 vaksin og 2 børn við bili




**Ja** eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum

Navn

Bústaður

Býur/bygd

Tel

e-mail

Send seðilin skjótast gjørligt til:
Sosialurin, Argjavegur 26, 160 Argir
ella faksa hann til fax nr. 314720



# Restin stendur eftir

**Tórbjørn Jacobsen tekur bert partin um, at løgmaður ikki kundi verið løgmaður í nøkrum øðrum landi aftur. Restin stendur við**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Løgmaður segði í røðu sínari á ólavsøku, at hetta metti málið millum seg og skuldsetingarnar frá Tórbirni Jacobsen sum úti av verðini. Hann hevði fingið eitt bræv frá tingmanninum, har hann tekur orðini aftur í seg, og hetta helt løgmaður vera nóg mikið til halda hina "vanligu" løgmansrøðuni, heldur enn hin styttru, sum hann segði seg hava skrivað við einari fráboðan um, at hann legði frá sær sum løgmaður.

Fráboðanin er soljóðandi:

"Hervið skal verða sagt frá, at skuldsetingarnar, sum eg havi sett fram ímóti løgmanni, løgmansembætinum og landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, hervið eru afturtiknar"

Við hesum reglum, sum løgmaður fekk kl. 10.45 ólavsøkudag, sigur Tórbjørn at nakrar skuldsetingar eru afturtiknar. Hvørjar tær eru verður mett at vera undirskilt, hvørjar skuldsetingarnar eru. Tórbjørn hevur undan hesum viljað verið við, at hann ikki ikki hevur skuldset løgmansembætið, men tað hevur so allíkavæl, sambært brævinum til løgmann ólavsøkudag.

Við Sjónvarp Føroya, sigur Tórbjørn Jacobsen, at hann sjálvur ringdi til løgmann fyri at vita eftir, hvat Anfinn Kallsberg metti sum trupulleikan og neyðugt at taka aftur. Tórbjørn sigur við Sjónvarpið, at hann løgmaður tók samgonguna sum gísil í hesum málinum, og løgmaður vildi hava Tórbjørn at taka aftur tann partin um, at løgmaður og ikki kundi vera stjórnaleiðari í nøkrum landi, sum løgmaður – sambært Tórbjørn Jacobsen – metti sum álop á løgmansembætið. Restin stendur eftir – eisini parturin um, at løgmaður og Jørgen Niclasen ikki hava dugað at skilja ímillum sítt egna og annara.

—Tað er tað, sum eg havi fingið at vita er trupulleikin, og tað er tað, sum eg havi tikið aftur, og tá stendur restin við, sigur Tórbjørn Jacobsen við Sjónvarp Føroya.

# Ein maður, nógv orð

BAKGRUND
*Heri á Rógvi & Rúnar Reistrup*

**Tórbjørn Jacobsen hevur sagt nøkur orð um løgmann og Jørgen Niclasen, sum fullu løgmanni fyri bróstið, og sum vóru beinleiðis atvoldin til eina rættiliga stjórnarkreppu, har løgmaður var fimtan minuttir frá at leggja frá sær. Men á ólavsøku legði Fólkaflokkurin trýst á Tórbjørn Jacobsen og Tjóðveldsiflokkin fyri at fáa skuldsetingarnar tiknar aftur, og hetta eyudnaðist í fyrstu atløgu. Fyrst át Tórbjørn nøkur av orðunum í seg aftur, ein dag seinni svølgdi hann restini. Men dagin eftir vendu nøkur av orðunum aftur út ígjøgnum munnin á væltalandi tingmanninum.**

Týsdagin 9. juli skrivar Tórbjørn Jacobsen eina viðmerking í bløðini undir heitinum "Fiskimenn og hornblásarar", har hann í einum broti sigur:

"Ringt er at liva við einum løgmanni og einum fiskimálaráðharra, sum orsakað av einari gloymdari fortíð, har ið ilt var at skilja á mørkunum ímillum eins egna og annara, ikki kundu sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi í heiminum."

Hetta brotið metir Halgir Winther Poulsen, advokatur í viðtali við Sosialin 10. juli vera so grovar skuldsetingar, at tær eru ærumeiðandi, um ikki Tórbjørn Jacobsen kann bera fram prógv fyri skuldsetingunum.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, boðar beinanvegin frá, at hesar skuldsetingarnar ikki sleppa at standa ósvaraðar. Men Tórbjørn hevur ongan hug at taka skuldsetingarnar aftur, og hetta endar við, at Anfinn Kallsberg leygarkvøldið 27. juli boðar Tjóðveldisflokkinum frá, at hann fer at taka seg aftur sum løgmaður á tingsetanini ólavsøkudag, um ikki Tjóðveldisflokkurin ella Tórbjørn Jacobsen taka skuldsetingarnar ímóti løgmanni og Jørgeni Niclasen, fiskimálaráðharra treytaleyst aftur innan ta tíð.



***Týsdagur 9. juli:***
*Tórbjørn setir fram skuldsetingar ímóti løgmanni og Jørgeni Niclasen*

Sunnudagin 28. juli, ólavsøkuaftan, sendir Tórbjørn út eitt tíðindaskriuv, har hann millum annað sigur:

"Sum skilst er tað bara orðalagið, um hvør ið kundi sitið sum stjórnarleiðari í øðrum landi, ið hevur sært onkran. Her er kanska tikið í so rívan til. Undirritaði kennir ikki førleikakrøvini í so máta í øllum heimsins londum. Og lat meg greitt staðfesta, at ætlanin við skrivingini hvørki var ella er at raka løgmansembæti sum soleiðis."

Tórbjørn velur soleiðis at taka orðini um at løgmaður og Jørgen Niclasen "ikki kundu sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi í heiminum" aftur í seg.

Men í sama tíðindaskrivi staðfestir hann, at hann ikki tekur orðini um at gloymdu fortíðina hjá Anfinni Kallsberg og Jørgeni Niclasen aftur:

"Ein eykasetningur í greinini hekk tó eftir, ið viðvíkti persónunum, sum sita í løgmanssessinum og í fiskimálaráðharrasessinum. Málini eru alkend, hava verið frammi fyrr, allir politikarar og stórur partur av almenninginum hava umrøtt tey, og soleiðis skuldu hesi fáu, og fyri tey flestu meinkunnugu, orð, ikki komið óvart á nakran, heldur ikki teir báðar umrøddu. Tað hevur verið eitt ynski frammi um, at undirritaði skuldi taka skrivaðu orðini í seg aftur, men av góðum grundum gerst hetta ikki." Skrivar Tórbjørn Jacobsen í tíðindaskrivininum.

Løgmaður heldur ikki at Tórbjørn nóg treytaleyst hevur tikið skuldsetingar sínar aftur í tíðindaskrivinum, og boðar aftur frá, at tekur Tórbjørn ikki allar skuldsetingarnar treytaleyst aftur, leggur hann frá sær, tá tingið verður sett næsta dag.



***Sunnudagur 28. juli:***
*Tórbjørn velur at svølgja orðini um at løgmaður og Jørgen Niclasen ikki kunnu vera ráðharrar nakra aðrastaðni í heiminum*

Mánadagin 29. juli, ólavsøkudag klokkan 10.45, eitt korter áðrenn løgtingslimirnir skulu í kirkju, fær Anfinn Kallsberg eitt skirv frá Tórbirni Jacobsen, sum stutt ljóðar:

"Hervið skal verða sagt frá, at skuldsetingarnar, sum eg havi sett fram ímóti løgmanni, løgmansembætinum og landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, hervið eru afturtiknar."

Løgmaður metir Tórbjørn hava tikið allar skuldsetingarnar aftur, og markerar við einari siðbundnu ólavsøkurøðuni, at hann heldur fram í landsins fremsta politiska embæti.



***Mánadagur 29. juli:***
*Tórbjørn svølgir øllum sínum skuldsetingum, og løgmaður kann halda fram.*

Týsdagin 30. juli, er innslag í Degi og Viku, har Tórbjørn Jacobsen sáðar iva um hann hevur tikið skuldsetingarnar um fortíðina hjá løgmanni og Jørgeni Niclasen aftur. Við Dag og Viku sigur Tórbjørn, at hann bert hevur tikið aftur skuldsetingina um at løgmaður og landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum ikki kundi sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi í heiminum.

"Tað er tað, sum eg havi fingið at vita er trupulleikin, og tað er tað, sum eg havi tikið aftur, og tá stendur restin við", sigur Tórbjørn Jacobsen við Sjónvarp Føroya.



***Týsdagur 30. juli:***
*Tórbjørn boðar frá, at ein partur av skuldsetingunum enn stendur eftir*